# Dumpingmálið er partur av størri ætlan

**Ákærurnar um at laksaútflytarar úr Kili hava selt laksin ov bíliga kann vera partur av eini størri ætlan sum skal oyðileggja fyri kilverskar laksaalarar. Hetta meinar stjórin í laksafelagnum Invertec, Mario Montanari**

*Jógvan H. Gardar, Oslo*

Mario Montanari sigur í samrøðu við Intrafish.no, at tað ikki er lætt at finna eina góða grundgeving og prógv fyri at ein útflytari sum bert hevur fýra prosent av marknaðinum skal kunna stýra laksaprísinum í ES. Hann heldur at lykilin er at finna í Noregi. Millum annað hevur fyrrverandi formaðurin hjá norsku alarunum, Tarald Sivertsen, kalla kilverskar alarar fyri parasittar.

- Vit verða eisini ákærdir fyri at hava sent stórar mongdir av laksi inn á marknaðin. Hetta vita allir partar at ikki passar. Vit økja um framleiðsluna, og tað gera norðmenn og aðrir eisini, sigur Mario Montanari.

Montanari vil ikki navngeva hvør hann meinar stendur aftanfyri ákærurnar.

### Einstøk feløg

- Kili hevur ikki havt trupulleikar við USA, Japan ella Europa. Men vit hava havt trupulleikar við einstøkum feløgum sum ákæra okkum fyri dumping. Øll vita hvør sum stóð aftanfyri dumpingákærurnar móti okkum í USA, og vit vita øll hvør sum ákærir okkum nú. Tað er hvørki Europa ella USA, sigur Montanari, sum heldur ikki heldur at norskir myndugleikar hava nakað við ákærurnar at gera.

Montanari er ikki í iva um at fleiri av teimum sum syrgdu fyri at Kili fekk dumpingákærur móti sær í USA, enn einaferð eru uppá spæl. Hann vísir eisini á at helmingurin av laksafeløgunum og 80 prosent av laksafóðurframleiðarunum í Kili eru europeiskir.

- Átakið móti okkum var longu ígongd fyri meir enn einum ári síðani. Fleiri feløg ynskja sær einkarrætt til marknaðin, og tey eru bebbarædd fyri eini fríari kapping. Vit hava fleiri av hesum eisini í Kili, so um tey vildu so kundu vit tosa saman her í Puerto Montt Aveny, har teir flestu laksaalararnir javnan hittast, sigur Mario Montanari.

# – Noreg mest at vinna í dumpingmálinum

**Norskir laksaalarar verða nú drignir inn í laksadumpingarmálið, og ákærdir fyri at hava givið ES upplýsingar um útflutningin úr Kili og Føroyum. Hetta skriva bløð í Kili.**

*Jógvan H. Gardar, Oslo*

Tá tíðindini um at ES-nevndin umhugsaði at ákæra laksaútflytarar úr Føroyum og Kili fyri at hava selt laksin ov bíliga til ES, vóru fleiri frammi sum mettu at tað ikki bert vóru írskir og skotskir alarar sum høvdu tosað við ES-nevndina. Millum teir sum mettu at onnur áhugamál vóru inni í myndini var senator Adolfo Zaldívar úr Kili. Onnur hava eisini víst á tað heldur løgna at norskir alarar vistu meir um ætlaninar hja ES enn nakar í bæði Kili og Føroyum.

Til Intrafish.no sier Zaldivar at Noreg er tað landið uttanfyri ES sum hevur størst áhuga í at fella aðrar alitjóðir.

Norska sendistovan í Santiago í Kili avvísir tí Zaldívar kemur við. Tey vísa á at Noreg ikki hevur møguleika at ávirka ES-nevndina.

Men søgurnar ganga í Kili, og í alivinnuni eru tað fá sum trúgva norsku sendistovuni. Har vilja søgurnar vera við at einstakir norskir alarar hava givið upplýsingar til ES-nevndina fyri at fáa eitt dumpingmál reist móti Kili og Føroyum.

Formaðurin fyri alararnar í Kili, Rodrigo Infante, sigur til blaðið La Tercera, at hann hevur hoyrt nógv slatur, men at hann ikki hevur fingið nakað neyvt prógv um at norskir alarar standa aftanfyri.

### Europa ímóti Kili

Senator Adolfo Zaldívar er ikki í iva um at tað eru sterkar rørslur í Europa sum meir enn gjarna royna at forða fyri at Kili byggir seg upp til at gerast ein tjóð sum útflytir annað enn rávørur.

Í samrøðu við blaði El Llanquihue, sigur Zaldívar at Kili noyðist at berjast fyri rættvísinum, men at tað kann vera fánýtis, tá dómstólurin sum skal døma í laksamálinum er europeiskur.

Zaldívar meinar, eins og umboð fyri føroyskarar alarar og landstýrið, at ES-londini kanska ikki eru so áhugaði í kapping sum tey siga seg vera.

Alivinnan í Kili hevur seinastu tíggju árini økt til at gerast ein vinna sum útflytir fyri meir enn eina milliard dollarar og meir enn 40.000 persónar arbeiða innan alivinnuna. Sambært Zaldívar kann alivinnan hjá teimum trífaldast komandi tíggju árini, og í øki 10 og 11, har hann er senator, kann alivinnan gerast týdningarmiklasta vinnan.

Hann meinar at europearar nú síggja at Kili kann framleiða laks við góðari góðsku sum er kappingarførur á europeiska marknaðinum, men at hetta ikki passar øllum í ES.

Í Býin



ÓLAVSØKAN 2002
PLATFORM

Matseðilin
Hósdagin 25. juli: Bankikjøt
Fríggjadagin 26. juli: Svínakjøt í karrysós
Leygardagin 27. juli: Oksasteik
Tysdagin 30. juli: Hamburgararyggur
Mikudagin 31. juli: Fiskafrikadellur
***
Seinnaparts-TILBOD frá kl. 14.00:
Juniorburgari 23,00
Maxiburgari ella
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311594

NÁTT BUSSURIN Á ÓLAVSØKU
Fríggjakveld 26/7:
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
frá City
Leygarkveld 27/7:
• Vestm.-Tórsh. kl. 21.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 22.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 00.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
frá City
Kvívík & Kollafjørður eftir avtalu
Ólavsøkuaftan 28/7:
• Vestm.-Tórsh. kl. 14.00
Heimaftur eftir steypahandanina
• Vestm.-Tórsh. kl. 21.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 22.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.00
• Vestm.-Tórsh. kl. 05.00
• Tórsh.-Vestm. kl. 06.00
frá Bustatanga
Ólavsøkudag 29/7:
• Vestm.-Tórsh. kl. 21.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 22.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.00
• Vestm.-Tórsh. kl. 05.00
• Tórsh.-Vestm. kl. 06.00
frá Bustatanga
Øssur Cristiansen
Tlf. 217752

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Vegna umbygging verður klubbin stongdur
Lýst verður nær vit hava opið aftur
UNDIRHALD

Í Býin hvønn hósdag



Í Býin

Tórshøll um Ólavsøkuna
Norska orkestrið String's og Exit & Nicolina av Kamarinum
Hósdagin 25/07 Undirhaldstónleikur 21-24 String's — Opið 19-24
Fríggjadagin 26/07 Dansur 24-04 String's
Leygardagin 27/07 Dansur 24-04 String's — Opið 17-04
Ólavsøkuaftan 28/07 Dansur 24-04 String's
Ólavsøkudag 29/07 Dansur 24-04 Exit & Nicolina av Kamarinum — Opið 19-04
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

Kaggin
Hóskvøldið spælir
Rúni Lindenskov
Double up frá 22-23 · Ókeypis atgongd
Fríggja- og leygarkvøldið spæla
Take Off — Opið frá 20-04
28. - 29. spæla
Fluffy Toys — Opið frá 20-04
www.kaggin.fo

SKRÁ FYRI ÓLAVSØKUNA
Hósdagin opið frá 17-24
Double Up & ókeypis atgongd frá kl. 21.00 til 22.00
LIVE tónleikur
Við Take Off frá 21-24
Fríggjadagin opið frá 17-04
ladies night & Double Up til kl. 23.00 -01.00
Discoteque frá 23-04
DJ Martin Kjærbo
Leygardagin opið frá 14-04
Discoteque frá 23-04
DJ Martin Kjærbo
Sunnudagin opið frá 14-04
Striptease við Bettinu sí www.stripshow.dk
Discoteque frá 22-04
DJ Eyðfinn Drewsen
Mánadagin opið frá 14-04
Striptease við Bettinu sí www.stripshow.dk
Discoteque frá 22-04
DJ Eyðfinn Drewsen
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós 69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Opið á Ólavsøku
RIO BRAVO RESTAURANT
Sunnudagin 28. juli 17.00-02.00
Mánadagin 29. juli 14.00-02.00
Casablanca
Sunnudagin 28. juli 12.00-02.00
Mánadagin 29. juli 12.00-02.00
Manhattan
Sunnudagin 28. juli 17.00-02.00
Mánadagin 29. juli 14.00-02.00
Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólkum eina góða Ólavsøku
VIT HITTAST Á MANHATTAN

Klubbadansur
Leygarkvøldið 27. juli spæla
BACON
Havnar Klubbi: staðið, har fólk møtir áðrenn tað er tíð at fara heim
HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1793
Sosialurin - 311820



TAXI
Koyr trygt frá og til - ring til BIL
311444 - 313525
Skjót & góð tænasta
SVARAR ALT DØGNIÐ
Bil - Mini Taxi
Bilstøðin á Farstøðini